Sjónarmið:

Kennir lærarin onga ábyrgd av vánaligum føroyskum

– og er gott føroyskt mál, føroysk stavseting og míllæra ikki ov torfør, tá ið so nógv ikki duga at skriva og tosa sítt egna móðurmál

Las í Sosialinum í heyst hvassorðað harmljóð frá Jóannes Skaale, lærara, um málið í føroysku bløðunum, og eg haldi serliga í Sosialinum. Hann ótaðist, nýtti nýtti ógvuslig orð at vísa á, hvussu vánaliga bløðini málbóru seg. Og so allar villurnar. Den jammur.

Og sjálvsagt, sum journalistur, tó ikki serliga virkin í løtuni, so harmaðist eg, at so illa er statt málsliga hjá mínum starvsfeløgum og mær við. Vit duga ikki at skriva okkara egna móðurmál. Jóannes Skaale hevur rætt, eg ivist ikki í, at allir journalistar við mær eru keddir av, at móðurmálið verður so illa umboðað í bløðunum.

Eg haldi ikki at tíðindafólk skulu nýta ovnógva tíð at tváa hendurnar í sápulúti teirra óseku. Vit mugu ásanna, at føroyskt mál, undir teimum umstøðum sum tíðindamenn á bløðunum arbeiða, er eitt knortlut mál, skal tað verða reint skrivimál, og størri tíðarneyðin er, tess fleiri gerast villurnar. Hetta er ongin umbering, vit mugu leggja okkum í selan fyri at gera arbeiðið betri.

Eg fari í hesum sjónarmiði at nema við tveir lutir, sum kanska kundu gjørt, at enn fleiri føroyingar fara at duga at tosa og skriva á móðurmálinum, also føroyskum. Eg eri onga løtu í iva um, at vánaliga málið í fjølmiðlunum, bert er tað ovasta av ísfjallinum. Hvussu man standa til hjá vanliga føroyinginum, tá so illa stendur til hjá fólki, sum dagliga einki annað gera enn at skriva føroyskt, ella royna at skriva føroyskt.

Eg fari at nerta við tveir lutir. Tann fyrsti er leiklutvurin hjá okkara fólkaskúlalærarum, sum eru teir fyrstu til at læra føroyingar at skriva. Teir sleppa at ávirka hvønn einsta føroying, frá hann er sjey ára gamal og næstu 10 árini, tá ið hann sum 17 ára gamal stendur á gáttini til vaksna lívið. Teir eru tíðum teir hvassorðastu, tá tað velst um at leypa á onnur, sum ikki duga skriva. Eg lesi hetta oftast privat sum eitt slag av sjálvkritikki, hóast lærararnir ikki skriva soleiðis beinleiðis.

Síðan til hin lutin. Staðfest er í Føroyum, og tað við sjeytummaseymi av okkara málkønu, at ein rættuliga stórur partur, kanska størsti parturin av føroyinginum dugir als ikki at tosa á móðurmálinum og hvaðna verri at skriva, so tað bara minnir um føroyskt. Skulu vit ikki heldur leggja kortini á bordið, verða reiðilig og játta, at føroyskt er ov torført fyri fjøldina av føroyingum og heldur royna at finna eina lættari leið nærri móðirmálinum.

Vit kundu kanska umskrivað vitugu orðini hjá Muhamed, profeti, sála, og siga, at tá fjøldin ikki vil nærkast móðirmálinum, tí tað er so torskilt, lat so málið nærkast fjøldini. Tað er jú fjøldin sum nýtir málið og tað føroyingurin tosar vil til allar tíðir í hansara hugaheimi vera føroyskt, sum hann skilir føroyskt.


Nú eru hvørki orðini hjá Jóannes Skaale sodnað og hvussu eg enn vendi hesum trupulleika, so fáið eg ikki annað burtur úr, enn at lærararnir í hvussu er eiga at taka ein part av skuldini fyri, at føroyskir blaðmenn skriva so vánaligt á móðurmálinum á egnar herðar.

Og meira eg hugsi, tess greiðari tess greiðari tykist tað mær, at háttvirdi Jóannes Skaale átti at verið eitt sindur meira eyðmjúkur, tá hann greiddi lesarum frá, at blaðmenn ikki duga at skriva føroyskt.

Og áðrenn vit fara víðari, so lat meg beinanvegin siga, at tað er ikki hvørjum manni beskorið at hava so gott bakland, hvat okkara móðurmáli viðvíkur sum Jóannes Skaale. Marius Johannesen, sáli, var ein úrmælingur í føroyskum og hevði stóran alsk til móðurmálið, og Jóannes hevur dugað væl at lurtað eftir Mariusi. Sjálvur veitti Marius mær manga fjálga og bøtandi hondina í málsligum tvístøðum. Málsligu vegleiðingarnar hjá Jóannes Skaale í fjølmiðlunum dugna málinum væl. Men tað kann ikki vera meiningin, at ein skal hava ein kapasitet av Mariusa formati tætt at sær í uppvøkstrinum, skal ein duga at skriva rætt føroyskt. Er soleiðis statt, so er also føroyska málið ov torført fyri vanlig fólk.

Kunnleikin til móðurmálið er hjá hvørjum tí einasta føroyskum tíðindamanni eitt beinleiðis úrslit av royndunum hjá føroyskum lærarum at læra føroyskar næmingar at skriva føroyskt. Urslitið hjá okkara fólkaskúla at læra føroyingar at málbera seg og skriva gott á føroyskum, kann neyvan sigast at vera framúrskarandi. Tað vildi verið at gjørt ov nógv av.

Lærarar, sum undirvísa í føroyskum, áttu at klórað sær í nakkanum og spurt seg sjálvan. »Hvat gjørdu vit skeivt? Hvat gera vit skeivt? Hví eru okkara næmingar, sum nú eru blaðmenn, so vánaligir?«



Jústinus Eidesgaard heldur, at lærararnir áttu at tikið í egnan barm, tá teir tala at vána fjølmiðlamálinum

Kanska áttu avvarandi myndugleikar og Móðurmálslærarafelagið við, at boðsent teimum lærarar sum undirvísa í føroyskum, fyri at vita um teir í heilatikið hava førleikan at undirvísa í móðurmálinum. Hava teir ikki, so mugu teir antin skúlast av nýggjum, ella mugu teir fáa sekkin.

Tað er vanligt aðrastaðni í samfelagnum, at dugir tú ikki títt arbeiði, so mást tú antin taka annað skinn um bak, ella missir tú starvið. Í Føroyum er ein lærari útlærdur, tá ið hann hevur tikið prógv, ja hann er tá útlærdur í allar ævir. Hann er fullkønur á sínum øki og nýtist ikki at læra meira, ynskir hann tað ikki sjálvur. Og vei tann, sum setir spurnartekin við hansara førleika. Heldur lærarin fingrarnar frá næmingunum bæði so og so, er hampuliga edrúur og lærir ikki ranga kristnilæru, so kann hann sita í sama starvi næstu fýrati árini, uttan at nakar hevur eftirlit við, um næmingarnir læra nakað ella ikki. Tað kemur stutt sagt ikki smørinum við. Og læra næmingarnir einki, so er tað í hvussu er ikki lærarin, sum hevur feilin. Eg minnist væl sjey árs royndina, men hon kom forbankað og seint.

Er ein lærarin fullkomiliga púrasta fyri ongum at læra frá sær í føroyskum, so kann hann, situr hann í eitt nú einum føroyskum bygdarskúla, forkoma møguleikanum hjá ættarliðið eftir ættarliðið eftir ættarlið av næmingum, at læra at skriva móðirmálið rætt. Í hesi grein tænir tað ongum endamáli at nevna nøvn, men eg kundi so syngjandi nevnt teir fyrstu 10 lærararnar, sum nú liggja undir grønutorvu, sum ikki megnaðu at fáa ein næming at skilja, hvussu ein skrivar bara nøkulunda rætt føroyskt og tíansheldur at málbera seg. Í grannabygdunum hjá hesum tíggju sótu aftur tíggju aðrir, sum høvdu evnini at læra frá sær og úr teimum bygdunum dugdu næmingarnir at skriva føroyskt. Allir hesir vóru skúlaðir á sama skúla, skuldu havt somu fortreytir. Munurin var bara, at onnur helvtin hevði evnini at læra frá sær í hesum fakinum, hin ikki. Frálæreugeinleikin er ikki ein treyt í fólkaskúlanum. Hevur tú staðið títt læraraprógv, so liggur sektin á, um tú dugir at undirvísa ella ikki. Ella sagt við øðrum orðum, so skal tú duga at undirvísa, um tú slett ikki dugir allíkavæl. Tað er ein óskrivað lóg.

Jóannes Skaale átti at tikið í egnan barm og spurt: »Hvat hava eg og mínir starvsfelagar gjørt skeivt, tá okkara næmingar duga so illa at skriva á móðirmálinum, og hvat kunnu vit gera fyri at sleppa burtur úr hesi vána støðu? Hvussu kunnu vit lærarar, sum hava alsk til móðurmálið, koma við eini bøtandi hond, heldur enn at seta okkum høgt, og við peikifingrinum lata spillandi tunguna leika vilt. Hon laðar ongan steinin aftur at raplaða málvarðanum.

Kanska er føroyskt ov torført at skriva. Tað kann ikki vera rætt, at bara næmingar við einum lærara sum er málsligur úrmælingur duga at skriva føroyskt. Kanska mistók Hammershaimb, sáli, seg, tá hann valdi okkara stavseting og okkara rættskrivingarreglur. Kanska vóru tær hentar ella tíðarhóskandi tá, men ikki í dag. Tað er vanligt at broyta støðu, tá ið ein sær, at tað sjónarmið ein hevur tikið vísir seg at vera skeivt. Tað er ongin skomm, um vit nú góð hundrað ár eftir Hammershaimb kanska fara at umhugsa eina nýggja og munandi lættari míllæru. Vit sleppa í hvussu er ikki uttanum, at tað eru alt ov mong, sum ikki duga at skriva á sínum egna móðurmáli, føroyskum. Og lærararnir duga heldur ikki at undirvísa í føroyskum, tí vánaliga skrivingin. Tað eru nógvir føroyingar, sum

framhald á næstu síðu



Nr. 202 – 23. oktober 1999 2 17

»Smábarnamál í fjølmiðlunum«

– Málburðurin í føroysku fjølmiðlunum er á so lágum støði, at eg í royndi og veru ikki havi orð fyri tí. Hvørjumfall verður so tuskað til, at tú sjálvur ert farin at ivast í, hvat er rætt, sigur Jóannes Skaale, fráfarin lærari í føroyskum

Høgni Mohr

Í 35 ár var hann lærari í føroyskum, 25 teirra á Sjómansskúlanum. Hann fór úr starvi á nýggjarárinum, og tekst nú við at týða m. a. sjóvinnu- og oljulógir fyri føroysku landsumsitingina. Harumframt lesur hann rættlestur í onkrari skaldsøgu. Føroyskt var hansara lív og breyð í arbeiðsárum, men nýklakti pensjónisturin sleppur ikki undan rættaraleikluti sínum. Tað er tí Sosialurin vitjar hann í dag.

Vit eru stødd í Grønulíð 10 í Tórshavn, har bjóðini Jóannes og Ólavur Skaale búskast. Í tunnum stendur grá Mercedes 190 bilurin, men hann man kenna seg einsamallan, tí úrvalið í tunnum, sum randar stóru vinkilbygdu húsini, er lítrikart enn so. Her stendur ein rustað DBS-

studningin fyri skúlan«. Sen-

– Ongin talar at. Føroyskir

vendir máltunnilinum niður

minnist, at hann fyri stuttum

Jóannes Skaale, málvinur, holvar føroyska fjølmiðlamálið av

Mynd: Jens Kristian Vang

Samrøðan við Jóannes Skaale stóð í Sosialinum 23. oktober í ár